Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársfrásøgn 2013

## (22. roknskaparár)

**Frumrit til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin**

Ársfrásøgnin er góðkend á stýrisfundi hin 22/5 - 2014

Fundarstjóri

HOYVÍKSVEGUR 5
P O.BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

TEL. +298 35 17 00
FAX +298 35 17 01

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um grunnin | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2013** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 |
| Notur | 12 |

## Leiðsluátekning

Stýrið hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2013 hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskkaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2013 og og av úrslitinum av grunnsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Argir, tann 16. apríl 2014

**Stýri**

| | | |
|---|---|---|
| Anfinn V. Hansen<br>formaður | Marita Rasmussen | Georg Hansen |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigaran í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin**

### Átekning til ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2013 og av úrslitinum av virksemi grunnsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2013 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin, varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 16. apríl 2014

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jørmann Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um grunnin

| | | |
|---|---|---|
| **Grunnurin** | Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin<br>c/o Fígging Landsins, Gjaldstovan<br>Kvíggjartún 1<br>FO-160 Argir | |
| | Telefon: | 352400 |
| | Telefaks | 352401 |
| | Roknskaparár | 1. januar - 31. desember<br>22. roknskaparár |
| **Stýri** | Anfinn V. Hansen, formaður<br>Marita Rasmussen<br>Georg Hansen | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, postrúm 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn. Fæ grunnsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 1,75 % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda 1,75 % av útgoldnum A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997. Við broytingini hevur persónurin rætt til eftirløn, tá hann hevur fylt 67 ár, annahvørt hann býr í Føroyum ella uttanlands.

**Fíggjarlig lýsing**

Í árinum er inngjaldið til grunnin frá løntakarum og arbeiðsgevarum økt við tkr. 6.603. Útgjaldingin til pensjónistar er økt við tkr. 11.339. Annar kostnaður og starvsfólkakostnaður eru tkr. 515 lægri enn undanfarna ár.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2013 eitt avlop uppá tkr. 33.352 (2012:37.573). Ársúrslitið í 2013 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 60.347 (2012:78.419). Eftir hetta verður eginogn grunnsins pr. 31. desember 2013 tkr. 1.057.861 (2012:997.514).

**Framtíðin**

Inngjøldini til grunnin væntast at vaksa nakað í 2014 eins og í 2013.

Mánaðarliga upphæddin í arbeiðsmarknaðar eftirløn í 2013 var kr 2.850. Fyri 2014 er útgjaldið sett til kr 2.930 um mánaðin. Búskapargongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan í inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina.

Avkastið av virðisbrøvum í 2014 verður merkt av, at rentustøðið á fíggjarmarknaðinum er lágt við ársbyrjan og hevur verið fallandi fyrstu mánaðirnar av árinum. Møguligar rentuhækkingar fara at geva vánaligt avkast fyri lánsbrøv, men óvist er, hvussu verður við rentustøðnum restina av árinum. Partabrøv og virkislánsbrøv hava givið gott avkast í 2013. Sveiggini í byrjanini av 2014 hava verið sera stór og óvissa er um, hvussu stóra ávirkan kreppan millum Russland og Urkraina fer at hava á marknaðirnar, serliga í Evropa. Hóast búskaparvøkstur er í stórum pørtum av heiminum, er samanlagt óvist um avkastið verður líka gott sum undanfarna ár.

Samanumtikið verður roknað við einum úrsliti í 2014, sum verður á sama stigi sum í 2013.

**Hendingar eftir roknskaparlok**

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársfrásøgnini.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er gjørd í samsvar við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri fyritøkur í flokki B.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl (heil túsund). Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum viðvíkjandi upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagið, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyramunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Rakstrarroknskapur

### Inntøkur av arbeiðsmarknaðareftirløn

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

Inntøka grunnsins – arbeiðseftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75 % av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskránni, umframt reguleringar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støðd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er eftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75 % av árliga útgoldnu A-inntøkuni.

### Kostnaður fyri arbeiðsmarknaðareftirløn

Kostnaðurin fyri arbeiðsmarknaðareftirløn er lógarbundna útgjaldingin til pensjónistar í roknskaparárinum.

### Annar uttanhýsis kostnaður v.m.

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til fyrisiting, útreiðslur til umsiting av ognum grunnsins, umframt annan kostnað.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir eru rentuinntøkur og rentukostnaður, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og kurstap viðvíkjandi virðisbrøvum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknaðir við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarstøða

**Fíggjarlig støðisogn**

**Áogn**

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárinum.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (virðisbrævamarknaðarkurs) við roknskaparlok.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

**Skuld**

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld v.m., verða tiknar við til amortiserað útveganarvirðið, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | t.kr. |
| 1 | Inntøkur av arbeiðsmarknaðareftirløn | 276.060.905 | 269.458 |
| 2 | Kostnaður til arbeiðsmarknaðareftirløn | -238.766.074 | -227.427 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -3.722.137 | -4.199 |
| | **Bruttoúrslit** | **33.572.694** | **37.832** |
| 3 | Starvsfólkakostnaður | -220.850 | -259 |
| | **Rakstrarúrslit** | **33.351.844** | **37.573** |
| 4 | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 47.385.979 | 45.172 |
| 5 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -20.390.456 | -4.326 |
| | **Ársúrslit** | **60.347.367** | **78.419** |

**Uppskot til býti av úrsliti**

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 60.347.367 | 78.419 |
| **Býtt tilsamans** | **60.347.367** | **78.419** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| Nota | | 2013 kr. | 2012 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 23.878.085 | 24.884 |
| | Tíðaravmarkingar | 28.742.413 | 30.270 |
| | Áogn tilsamans | 52.620.498 | 55.154 |
| 6 | Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 985.546.576 | 875.018 |
| | Virðisbrøv tilsamans | 985.546.576 | 875.018 |
| | Tøkur peningur | 25.944.846 | 68.115 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **1.064.111.920** | **998.287** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.064.111.920** | **998.287** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | t.kr. |
| | **Eginogn** | | |
| 7 | Flutt úrslit | 1.057.861.249 | 997.514 |
| | **Eginogn tilsamans** | **1.057.861.249** | **997.514** |
| | **Skuld** | | |
| 8 | Skuld til kreditstovnar | 5.901.237 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 349.434 | 604 |
| | Onnur skuld | 0 | 169 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 6.250.671 | 773 |
| | **Skuld tilsamans** | **6.250.671** | **773** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.064.111.920** | **998.287** |

**9 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**10 Eventualpostar**

# Notur

| | 2013 | 2012 |
|---|---:|---:|
| | kr. | t.kr. |

**1. Inntøkur av arbeiðsmarknaðareftirløn**

| | | |
|---|---:|---:|
| Eftirlønargjøld, løntakarar | 148.582.351 | 144.235 |
| Eftirlønargjøld, arbeiðsgevarar | 127.478.554 | 125.223 |
| | **276.060.905** | **269.458** |

**2. Kostnaður til arbeiðsmarknaðareftirløn**

| | | |
|---|---:|---:|
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | 238.766.074 | 227.427 |
| | **238.766.074** | **227.427** |

**3. Starvsfólkakostnaður**

| | | |
|---|---:|---:|
| Lønir og samsýningar | 216.954 | 254 |
| Aðrar útreiðslur viðv. sosialari trygd | 3.896 | 5 |
| | **220.850** | **259** |

**4. Aðrar fíggjarligar inntøkur**

| | | |
|---|---:|---:|
| Rentur, peningastovnar | 234.803 | 1.720 |
| Rentur, lánsbrøv | 17.507.731 | 19.014 |
| Rentur, áogn frá sølu | 299.810 | 220 |
| Vinningsbýti, partabrøv | 713.224 | 361 |
| Staðfestur kursvinningur, partabrøv | 465.299 | 5.422 |
| Ikki-staðfestur kursvinningur, partabrøv | 19.299.877 | 4.101 |
| Staðfestur kursvinningur, lánsbrøv | 6.420.804 | 2.920 |
| Ikki-staðfestur kursvinningur, lánsbrøv | 2.444.431 | 11.414 |
| | **47.385.979** | **45.172** |

## Notur

| | | 2013<br>kr. | 2012<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **5.** | **Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| | Røktarkostnaðir minus refusiónir | -574.266 | -456 |
| | Staðfest kurstap, partabrøv | 235.864 | 0 |
| | Ikki staðfest kurstap, partabrøv | 3.111.769 | 0 |
| | Staðfest kurstap, lánsbrøv | 11.005.941 | 4.782 |
| | Ikki staðfest kurstap, lánsbrøv | 6.611.148 | 0 |
| | | **20.390.456** | **4.326** |
| **6.** | **Onnur virðisbrøv og kapitalpartar** | | |
| | Lánsbrøv og partabrøv | 985.546.576 | 875.018 |
| | | **985.546.576** | **875.018** |
| **7.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 997.513.882 | 919.095 |
| | Fluttur vinningur ella hall í árinum | 60.347.367 | 78.419 |
| | | **1.057.861.249** | **997.514** |
| **8.** | **Skuld til kreditstovnar** | | |
| | Fígging Landsins | 5.901.237 | 0 |
| | | **5.901.237** | **0** |

**9. Veðsetingar og trygdarveitingar**

Ongar ognir hjá grunninum eru veðsettar, og ongar aðar trygdir eru veittar.

**10. Eventualpostar**

**Eventualskyldur**

Ongar aðrar skyldur hvíla á grunninum.